## Brævatkvøða horvin

VAL
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Ein brævatkvøða, sum skuldi verið send úr Klaksvík og norður á Viðareiði var ikki komin fram á middegi í gjár. Nógv varð gjørt fyri at leita eftir atkvøðuni, bæði í Klaksvík og á Viðareiði. Brævatkvøðan stavaði frá einum viðingi, sum er á Røktarheiminum í Klaksvík.

Mannagongdin er tann við brævatkvøðu, at kommunan, har viðkomandi atkvøður skal syrgja fyri, at veljarin fekk møguleikan at velja. Kommunan sendir síðan brævatkvøðuna á posthúsið. Hetta hevur kommunan í Klaksvík eisini gjørt. Men atkvøðan kemur ikki víðari. Hon er horvin í postinum.

# Mótmæla sambinding av Leitisvegi og Rúnarvegi



*Tað er ikki fallið í góða jørð hjá borgarum við Rúnarveg og Lómsveg, at Runavíkar kommuna ætlar at binda Leitisveg og Rúnarveg saman við gjøgnumkoyrandi bilaferðslu.*
*– Tá ið vit settu búgv her, fingu vit at vita frá kommununi, at talan altíð fór at vera um "blindan veg" og ikki gjøgnumkoyringarveg, tí økið norðanfyri Rúnarveg var lagt av til fríøki, siga borgararnir.*

**- Vit halda, at Runavíkar kommuna handlar í óðum verkum, siga borgarar í Runavíkar kommunu í mótmælisskrivi, sum tey handaðu mánadagin**

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin bóru fólk í Runavíkar kommunu eitt mótmælisskriv til býráðið, har mótmælt verður ætlan býráðsins at samanbinda Leitisveg og Rúnarveg, soleiðis at møguleiki verður fyri gjøgnumkoyrandi bilaferðslu. Saman við mótmælisskrivinum vórðu undirskriftir frá borgarum, sum búgva við Rúnarveg og Lómsveg, eisini handaðar kommununi. Hesar vóru 60 í tali.

Borgararnir vísa á, at nógvar grundgevingarnar eru fyri mótmælinum og taka tey nøkur dømi fram:

- Við hesari víðkan av vegakervinum í Runavíkar kommunu, kann roknast við nógvari ferðslu úteftir Leitisvegi - ikki minst, tá ið hugsað verður um, at nýggi dagstovnurin, sum verður bygdur í løtuni, liggur beinleiðis í framhaldi av hesum vegastrekki.
- Vegirnir, bæði Leitisvegur og Rúnarvegur, eru als ikki bygdir til at tola hesa ferðslu. Teir eru so mikið smalir, og parkeringsviðurskiftini eru so vánalig, at roknast kann við ruðuleika og einum sera vandamiklum vegastrekki.
- Í hesum býlingi eru ógvuliga nógv børn, og er hetta at frøast um, men henda gleðin kann gerast ógvuliga stokkut. Í dag vita vit, hvar børnini eru, hvar tey spæla, nevniliga her rundan um húsini, t.v.s. meira og minni á vegnum. Vælvitandi, at vegurin ikki skuldi verið nakað spælipláss, so meta vit hetta, sum nú er, trygt og gott, tí tann lítla ferðslan, sum er, hevur altíð børnini í huga. Meira ferðsla á hesum vegastrekki, fer at gera hetta til eitt sera vandamikið økið. Eisini skal havast í huga, at fleiri dagrøktarmammur búgva í hesum býlingi.
- Í býlinginum hava vit eitt sambýli, ein bústovn og eitt ellis-og røktarheim, sum ætlandi verður útbygt. Hesi fólk hava als ikki førleika/møguleika at ansa sær í ferðsluni.
- Tá ið vit settu búgv her, fingu vit at vita frá kommununi, at talan altíð fór at vera um "blindan veg" og ikki gjøgnumkoyringarveg, tí økið norðanfyri Rúnarveg var lagt av til grønt øki/fríøki. Vit undrast á, at eitt kommunustýri, sum til valið segði seg vilja hava meira opinleika - sum vildi gera tað lættari hjá borgarunum í kommununi at koma til orðanna - ikki hevur gjørt nakað fyri at koma beinleiðis á tal við okkum.

Í mótmælisskrivinum siga borgararnir, at øll henda ætlan ber ikki brá av, at núverandi kommunustýrið hugsar um trivnaðin hjá teimum, sum búgva í økinum.

- Fyri okkum sýnist hetta, sum um handlað verður í óðum verkum, siga tey.

Borgararnir halda annars, at ætlanin at stykkja út suðureftir úr Leitisvegi uttan iva er góð, og tørvur er á hesum.

- Men um vit so skrædna, skilja vit ikki, hví gjøgnumkoyrandi bilaferðsla skal verða.

Tey halda, at eitt gott hugskot hevði verið at samanbundið vegirnar við gonguteigi ella onkrum líknandi.

- Hetta kundi hóast alt verið eitt vakurt øki, eitt fríøki, sum stórur saknur er á í kommununi.

At enda í mótmælisskrivinum heita borgararnir staðiliga á kommununa um at umhugsa hesa avgerð einaferð enn og við skynsemi hugsa um tey, sum búgva her, eins og hugsað verður um komandi ættarlið.

- Tað var hóast alt høvuðsevni á seinasta kommunuvali, at nú skuldi trivnaðurin hjá borgarunum hava fyrsta prioritet, siga íbúgvarnir við Rúnarveg og Lómsveg.

### Allir hava fingið skrivið

Tað var býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, sum tók ímóti mótmælisskrivinum.

Í stuttari viðmerking, sigur Rodmundur, at hann lovaði teimum, sum møtt vóru, at býta skrivið út til allar býráðslimirnar sama kvøldið, og tað gjørdi hann eisini. Sjálvur las hann skrivið seinni um kvøldið.

- Í løtuni havi eg onga viðmerking til tað, sum borgararnir føra fram. Skrivið verður

viðgjørt í teknisku nevnd um einar 14 dagar, sigur Rodmundur Nielsen.

## Býr hjá pápanum

HÚSANEYÐ
*Stefan í Skorini*

Í blaðnum fríggjadagin í seinastu viku var grein um einliga mammu í Havn, sum ikki hevði tak yvir høvdið, tí ongar íbúðir vóru at finna.

Í greinini stóð, at hon og sonurin ikki høvdu nakrastaðni at búgva, men hetta er ikki rætt. Pápin av dronginum hevur vent sær til Sosialin og gjørt vart við, at sonurin nú býr hjá sær, og at hann tí ikki er heimleysur.






*Uppstillingina í handilsglugganum hevur ein kona í Vágunum skipað fyri, men samskifti við Klaksvíkina hevur einans gingið gjøgnum e-mail*

# Litaval fingið nýggjar karmar



*Sámal Eyðfinn Akursmørk er sera væl nøgdur við nýggju umstøðurnar hjá Litaval í Klaksvík*

**Mánadagin kundi Litaval í Klaksvík lata dyrnar upp í nýggjum hølum á Klaksvíksvegnum**

HANDILSLÍV
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Nógv komu kom inn á gólvið, tá Litaval í Klaksvík mánadagin lat dyrnar upp í nýggjum hølum.

Litaval hevur í fleiri ár hildið til í leigaðum hølum frá Klaksvíkar Byggivirki, men hesi høli eru nú seld til landið og skulu nýtast til kontórvirksemi.

Tískil máttu tey í Litaval út at leita eftir onkrum nýggjum, og mánadagin kundu tey bjóða viðskiftafólkunum inn í nýggju hølini, sum tey nú leiga frá JH Møblum.




*Inni í nýggju hølunum er ljóst og rúmligt*

### Ein heildarloysn

Sámal Eyðfinn Akursmørk, sum dagliga rekur Litaval í Klaksvík, sigur, at starvsfólkini í handlinum eru stak væl nøgd við teir nýggju karmarnar.

- Vit eru nú í sama bygnini sum JH Møblar, og hetta ger, at kundin hevur møguleika fyri at fáa eina heildarloysn til húsini inni í sama bygnini, sigur Sámal Eyðfinn.

- Vit selja máling og gólv, og JH Møblar selur búnýti og annað til húsini, so her er alt á einum stað, greiðir hann frá.

Sámal Eyðfinn keypti í 2000 helvtina av Litaval, so at hann í dag stendur sum eigari saman við einum øðrum. Men Sámal Eyðfinn ætlar í nærmastu framtíð at keypa hina helvtina eisini, so at hann nú fer at standa sum einasti eigarin.

### Teldusamskifti

Nýggju hølini hjá Litaval eru sera rúmlig og snotulig at koma inn í, og serliga leggur ein merki til vøkru uppstillingina í vindeyganum.

Sámal Eyðfinn greiðir frá, at ein dekoratør í Vágunum hevur skipað fyri framstillingini í vindeyganum. Men tó hevur hon ongantíð sæð sjálvt vindeygað.

- Tað er ein stuttlig søga, tí konan hevur ongantíð vitjað okkum her í Klaksvík, men alt samskifti okkara millum hevur gingið gjøgnum telduna, fortelur hann.

Hendan kona hevur sent uppskot, litir og annað gjøgnum e-mail til Klaksvíkar, og síðani hava tey sent myndir aftur til hennara.

Enn eitt prógv uppá, at møguleikarnir eru nógvir nú í okkara teldutíðum.

### Nógv fólk vitjaðu

Nógv fólk vitjaðu Litaval tann fyrsta dagin í teim nýggju hølunum.

Sámal Eyðfinn sigur, at yvir 200 fólk stukku inn á gólvið, og tað var nógv fleiri, enn tey høvdu væntað.

Víðari greiðir hann frá, at tey eisini hava fingið óføra nógva hjápl ymsa staðni frá í samband við sjálva flytingina.

- Vanliga eru vit 4 fólk í handlinum, men upp undir flytingini hava eini 15 fólk hjálpt til ymsastaðni, sigur hann at enda í stuttu samrøðuni.